## Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og stundum regn ella mjørki. Hitin kemur upp millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin regn. Seinnapartin minkar hann vindin og hækkar upp í útnyrðing og tað klárar í. Hitin fellur niður í 2 til 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn. Hitin um 5 stig.

# Milliónaíløgur fyri Vestan

*Kirkjubøar Kommuna ger íløgur fyri fleiri milliónir krónur í parkeringspláss í Kirkjubø og skúla á Velbastað*

EDVARD JOENSEN

Nýggjan skúla á Velbastað fyri góðar seks milliónir og parkeringspláss í Kirkjubø fyri eina millión er stór íløga hjá eini lítlari kommunu. Eisini hóast partar av íløguni verða goldnir av øðrum.

Kirkjubøar Kommuna hevur saman við Landsverkfrøðinginum gjørt eitt stórt parkeringspláss norðanvert lendingina í Kirkjubø. Samlaði kostnaðurin fyri parkeringsplássið og eitt hús, sum skal standa á økinum, verður umleið ein millión krónur, sigur Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður í Kirkjubøar Kommunu.

Tað var so, at ferðslan til Kirkjubøar rætt og slætt varð vorðin ov nógv. Tungu bussarnir, sum fluttu ferðafólk at síggja fornminnini, vóru til ampa fyri lokalu ferðsluna og partvís eisini fyri bygdarlívið sum heild, sigur bygdarráðsformaðurin. Tey vóru farin at óttast fyri, at tann gamli vegurin ikki fór at halda.

Neyðugt var tí at gera okkurt munandi til tess at hjálpa upp á støðuna. Og í samráð við Landsverkfrøðingin og Fornminnissavnið varð so avgjørt at gera hetta stóra parkeringsplássið í fjøruni.



*Parkeringsplássið í Kirkjubø er gjørt í samráð við Landsverkfrøðingin og Fornminnissavnið*
**Mynd: Jens Kr. Vang**

Anfinn Brekkstein sigur, at hetta longu hevur víst seg at vera ein góð loysn, hóast plássið enn ikki er endaliga liðugt. Landsverkfrøðingurin skal asfaltera tað í summar. Tey hava frá fleiri bussførarum frætt, at teimum dámar tað væl, tí tað lættir teimum almikið um, tá farið verður til Kirkjubøar.



*Í nýggja skúlanum á Velbastað verða tvær skúlastovur í ovaru hæddini*
**Mynd: Jens Kr. Vang**

Umframt sjálvt parkeringsplássið er ætlanin at seta eitt hús á økið. Har skal vera WC, pláss at skifta á smábørnum og vanligt hvíldarúm, sum ferðafólkið kann brúka.

Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður, sigur, at tey hava fingið uppskot til húsið frá Palla Gregoriussen, arkitekti, sum hevur gjørt eina tekning, sum fær húsið at líkjast tí umhvørvinum, sum er í Kirkjubø frammanundan. Og tað uppskotið eru tey fegin um. Men enn er endalig avgerð um húsið ikki tikin, og tað verður ikki bygt í ár, sigur bygdarráðsformaðurin. Men næsta ár vónar og væntar hann, at tað stendur klárt, tá ferðafólkini fara at koma.

Kostnaðurin fyri húsið verður einar 325.000,- krónur. Helvtin er játtað sum stuðul úr Grunni Ferðavinnunnar, sigur Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður í Kirkjubøar Kommunu.

Eisini á Velbastað ger kommunan eina stóra íløgu. Har verður nýggjur skúli bygdur, sum skal takast í brúk eftir summarfrítíðina í ár.

Hesin skúlin kostar 6,3 milliónir krónur, sigur Anfinn Brekkstein. Hann verður bygdur beint norðan fyri gamla skúlan, og har verður møguleiki fyri at byggja uppí, um tað gerst neyðugt seinni.

Í skúlanum verða tvær skúlastovur í ovaru hæddini. Gongd verður ímillum, har tað fer at bera til at innrætta høli til undirvísing. Í niðaru hæddini er ein stova, har køkur verður settur upp. Umframt er eitt 50 fermetra stórt rúm tøkt at taka til, sigur Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður.

Tað eru 23 skúlabørn á Velbastað. Tríggir lærarar eru í skúlanum.




Lágtrýstið við Hvarvið fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum í nátt.




Millum lágtrýstið við Hvarvið og hátrýstið við Írland rekur lýggj luft eitt skifti móti Føroyum.




**Hitalagið mált frá 13./03. kl $06^{00}$–14./03. kl $06^{00}$. Hitin í gjár: 1,3°C**
Minsti hiti máldur í mars: **÷8,7°** Mesti hiti máldur í mars: **12,0°**




Avfallið: 1,4 mm – **mált frá 13./03. kl $6^{00}$–14./03. kl $06^{00}$**
Avfallið higartil í mars: 88,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷11 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 12 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannahavn | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | ÷1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 14 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | – |
| New York | 6 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## Vestfalskyrrindi

13. mars: Fyrra kvarter
15. mars: Mánin næstur jørðini
20. mars: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mar | 1:49 | 14:38 | 0:49 | 13:38 | 1:04 | 13:53 | 3:49 | 16:38 | 4:49 | 17:38 | 0:04 | 12:53 | 11:53 | — | 2:04 | 14:53 | 3:04 | 15:53 | 1:34 | 14:23 | 2:49 | 15:38 |
| 16. mar | 3:22 | 15:57 | 2:22 | 14:57 | 2:37 | 15:12 | 5:22 | 17:57 | 6:22 | 18:57 | 1:37 | 14:12 | 0:37 | 13:12 | 3:37 | 16:12 | 4:37 | 17:12 | 3:07 | 15:42 | 4:22 | 16:57 |
| 17. mar | 4:28 | 16:55 | 3:28 | 15:55 | 3:43 | 16:10 | 6:28 | 18:55 | 7:28 | 19:55 | 2:43 | 15:10 | 1:43 | 14:10 | 4:43 | 17:10 | 5:43 | 18:10 | 4:13 | 16:40 | 5:28 | 17:55 |
| 18. mar | 5:18 | 17:39 | 4:18 | 16:39 | 4:33 | 16:54 | 7:18 | 19:39 | 8:18 | 20:39 | 3:33 | 15:54 | 2:33 | 14:54 | 5:33 | 17:54 | 6:33 | 18:54 | 5:03 | 17:24 | 6:18 | 18:39 |

Kelda: Skipalistin 2000